Vetrarmótin 2002/03

MÓTAFRAMSÝNING
Myndir: Jens Kristian Vang

Hóskvøldið var stór mótasýning uppi á Hotel Føroyum. Tað var Miðbýarfelagið, ið stóð fyri.

Heilt fitt av fólki var komið saman at síggja, hvat boð Miðbýarfelagið hevði til vetrarmótan í ár. Handlarnir í miðbýnum vístu fram klæðir bæði til ung og gomul, og mótasýningin var heilt vist bæði áhugaverd og fjølbroytt.

Hjørdis Maria gitti rætt og vann 5.000 krónur

VINNINGUR
Hilmar Jan Hansen

Tá danski samferðslumálaráðharrin Flemming Hansen herfyri læt nýggja motorvegin millum Brønderslev og Hjørring upp, gjørdi ein sjey ára gomul føroysk genta kvetti.

Hjørdis Maria Dagfinsdóttir, dóttir Ann Heðinsdóttir Mortensen úr Havn og Dagfinn Joensen úr Klaksvík, vann tær 5.000 krónurnar, ið vóru vinningurin í einari internetkapping, sum norðurjútska amtið skipaði fyri.

Á sínari heimasíðu vildi amtið hava fólk at gita, hvørjar býir hesin nýggi teinurin bant saman, og har var Hjørdis Maria millum tey yvir túsund, ið svaraðu spurninginum rætt.

Í lutakastinum millum øll hesi kom hennara navn upp úr posanum, og so var sjey ára gamla gentan, ið saman við foreldrunum býr í Aalborg, brádliga 5.000 krónur ríkari.

Sjálvur amtsborgmeistarin Orla Hav handaði henni kekkin við øllum pengunum, og harumframt fekk hon eisini ein køkumann, sum hon og tvey ára gamla lítlasystirin Catharina skjótt gjørdu enda á.

Umframt at greiða atkvøðu, kundu øll tey luttakandi í kappingini eisini skriva eina lítla viðmerking til, hvønn týdning tað hevði, at motorvegur nú kom millum Brønderslev og Hjørring, og har skrivaði Hjørdis Maria, at »tað er blivið betur hjá øllum teimum, sum koyra í Norðurjútlandi«.

Enn hevur Hjørdis Maria ikki tikið avgerð um, hvussu tær 5.000 krónurnar skulu brúkast, men í øllum førum fer hon at keypa sær eina nýggja súkklu komandi summar, og so heldur hon eisini, at lítlasystir skal fáa eitt sindur burtur av tí stóra vinninginum.

Norðurjútski amtsborgmeistarin Orla Hav handar sjey ára gomlu Hjørdis Mariu Dagfinsdóttir kekkin við teimum 5.000 krónunum

Nýggjur eldsløkkibilur til Klaksvíkar

Nýggi bilurin avmyndaður uttan fyri verksmiðjuna í lítla býnum Flogby í Svøríki, har eldsløkkiliðsbilar verða tilevnaðir

Mynd: Klaksvíkar Kommuna

Klaksvíkar kommuna fær í næstum nýggja eldsløkkibil. Bilurin er av merkinum Scania og er innrættaður soleiðis, at hann gongur gjøgnum tunnlarnar norður um fjall

ELDSLØKKING
Rúna Sivertsen

Nýggi eldsløkkibilurin, sum Klaksvíkar Kommuna hevur býlagt, kostar 1,5 mill. kr. Bilurin tekur 2 tons.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur við Sosialin, at bilurin, sum er ætlaður at økja um trygdina hjá borgararnum í kommununi, eisini er ein fyrireiking til trygdina í samband við undirsjóartunnilin.

Sum er, hava vit 4 bilar, og 16 menn eru tengdir at sløkkiliðstøðini.

Í løtuni samráðist Klaksvíkar Kommuna við grannakommunurnar um samstarv í samband við eldsløkking.

Ein av sløkkiliðsmonnunum hjá Klaksvíkar Kommunu, Bárður Klakkstein, hevur gjørt eina sera áhugaverda heimasíðu, sum kallast, BkFiresite.

Her finnur tú nærum alt, sum hevur við eld og eldsløkking at gera; brunalógir, fyrstahjálp, neyðstøða og m.a.

Adressan er: http://heima.olivant.fo/~l_s_d/bkfiresite_v2.0/

Kári Kjælnes er leiðari fyri sløkkiliðnum í Klaksvík.

TELEFONBÓKIN 2003

Seinasta freist at lata broytingar inn er hósdagin 7. november 2002

Í mars 2003 verður telefonbókin fyri ár 2003 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

Hvítu síður

Hósdagin 7. november 2002 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2003 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 620 í telefonbókini 2002, ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

Eykaupptøkur v.m.:
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 50,- kr. (uttan mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

Búmerki:
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

Gulu síður

Týsdagin 7. november 2002 er seinasta freist, at boða frá av nýggjum, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

Prísir:
(A)+(D) Standardlýsing .... kr. 650,00
(B) Stórt navn .... kr. 50,00
(C) Innramming .... kr. 100,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) .. kr. 25,00
(sí dømi á s. 618 í Telefonbókini 2002)

Litlýsingar:
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 619 í telefonbókini 2002, ið skal sendast til:
Telefonlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum
Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31
www.nummar.fo · info@nummar.fo
www.gulu.fo · info@gulu.fo